## Góð skoðsmál í Noreg

Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen dømdu um vikuskiftið dyst í Cup Winners Cup millum norska Gjerpen og grikska Armi School Patra. Undan uppgerðunum var norska liðið stórfavorittur, men tá tá tær taptu við fýra málum í Grikkalandi, var lagt upp til heilt spennandi returdyst. Fyrstu løtuna leikaði eisini javnt á, men eftir steðgin fór norska liðið av álvara avstað, og talan gjørdist um trivaligan 38-21 sigur. Føroysku dómararnir siga, at tað var ikki fyrr enn seinasta korterið, at høllin av álvara kom í kók, og at teir tí fingu frið til sína uppgávu. Og sum skilst, so varð avrikið eisini væl og virðiliga góðkent av EHF-eygleiðaranum.

## Jes Høgh raktur av blóðtøppi í heilanum

Fyrrverandi danski fótbóltsleikarin, Jes Høgh, varð sunnunáttina raktur av einum blóðproppi á heilan. Hetta veit heimasíðan hjá Ekstrablaðnum, eb.dk, at siga frá. Jes Høgh var staddur á einum hotelrúmi í Keypmannahavn, tá hann knappliga bleiv raktur av blóðproppinum. Hann bleiv bráðfeingisinnlagdur, og innan tríggjar tímar hevði hann fingið evnið trombolyse, sum loysir upp blóðproppar. Jes Høgh noyddist at gevast við fótbólti í 2001 orsakað av einum afturvendandi skaða, og seinastu tíðina hevur hann arbeitt sum kommentator hjá Canal Plus.

KÍF-VÍF 29-22 (12-10):

# KÍF bukaði oddaliðið

**KÍF læt ongan iva vera um úrslitið, tá teir tóku ímóti oddaliðnum, VÍF, í Atlantic Airways deildini. VÍF fylgdi hampiliga væl við í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki sótu kollfirðingar á tí mesta**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mikudagin hittust VÍF og KÍF í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini. Tann dystin vann VÍF tepurt, og hetta var samtundis triði sigurin hjá vestmenningum ímóti KÍF í hesum kappingarárinum.

Um vikuskiftið møttust tey so aftur, men hesaferð var høllin í Kollafirði karmur um dystin, sum var tann næsti hjá feløgunum í endaspælinum í landskappingini.

### KÍF fekk flúgvandi byrjan

Tað var lítið, sum bendi á, at vestmenningar skuldu fara at vinna fjórða dystin á rað ímóti kollfirðingum. KÍF legði út sum eitt ódnarveður, og fyrsta korterið fekk VÍF ikki eitt bein til jørðina. Teir høvdu stórar trupulleikar av ágangandi verjuni hjá KÍF, samstundis sum álopsspælið hjá KÍF hekk væl saman fyrstu løtuna.

Venjarin hjá VÍF, Dia Midjord, tók Time-Out um miðjan fyrra hálvleik, og hetta fekk veruliga gongd á vestmenningarnar.

Teir valdu at fara út at mansverja Damir Oros, og nú fingu teir eisini gongd á verjuspælið.

Hesa løtuna helt verjan hjá vestmenningum KÍF frá at skora í heili átta minuttir og nú sá út til, at VÍF hevði sett seg ordiliga á dystin, og líkt var til, at teir fóru at fara frá heimaliðnum.

### Drepandi mál

Síðstu løtuna av fyrra hálvleiki vaknaði KÍF tó aftur. Verjan hjá kollfirðingum fekk aftur fatur á VÍF, og síðstu fimm minuttirnar av hálvleikinum brúkti KÍF til at endurvinna leiðsluna.

Tá ein hálvur minuttur var eftir at spæla, fór KÍF í síðsta álopið av fyrra hálvleiki við einum manni færri. KÍF spældi tíðina út, men fekk eitt 3-meturkast í síðsta sekundi. Hetta smekkaði Daniel Rapa beint í málið, og so fór KÍF til hálvleiks við eini 2-mála leiðslu.

### Eingin ivi

Um tað var júst hetta málið, sum drap vestmenningar, skal vera ósagt. Sálarliga tóktist tað í øllum førum svíða hart, og frá fyrstu løtu av seinna hálvleiki var bara ein vinnari.

Sum dysturin leið, økti KÍF bara um leiðsluna, um um miðjan hálvleikinum førdi heimaliðið við heili 7 málum.

Við at mansverja bæði Oros og Rapa gjørdi VÍF eina seinastu roynd, men tað tóktiskt ikki gera mun. Aðrir kollfirðingar tóku yvir, og serliga Rógvi Weyhe var undangongumaður henda dagin.

Kollfirðingar vóru snøgt sagt betra liðið á øllum økjum hendan dagin. Verjan var betur, álopið var betur, og so tóktust kollfirðingarnir vera nógv meir uppsettir til dystin.

Við sigrinum hava teir nú togað seg upp á 3. plássið í bestu mansdeildini, og um teir halda fram við spælinum, teir hava sýnt síðstu tveir dystirnar, so er ikki óhugsandi, at teir eisini kunnu hótta annað plássið hjá StÍF.



*KÍF hevur verið flúgvandi síðani vetrarsteðgin. Sunnudagin vundu teir burtur úr oddaliðnum, og nú tykist KÍF at vera veruligur biðil til annað finaluplássið*
*Mynd: Álvur*

**FAKTA**

**KÍF-VÍF 29-22 (12-10)**
**Málskjúttar:**
**KÍF:** Damir Oros 9 (3), Rógvi Weyhe 8, Daniel Rapa 6, Gert Hansen 4, Karl Johan Djurhuus 1, Arnbjørn Hansen 1
**VÍF:** Sámal Joensen 10, Áki G. Olsen 6, Áki Olsen 2, Sjúrður Poulsen 2, Ingi Olsen 1, Regin Joensen 1 (1)
**Brotskøst:** KÍF 3, VÍF 2
**Útvísingar:** KÍF 2, VÍF 2
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen

## Verjan vann dystin

Strikuspælaran hjá KÍF, Gert Hansen, helt, at verjan var størsti munurin á liðunum henda dagin.

- Móti VÍF mugu allir bara fara inn og kempa sum óløgir, og tað haldi eg, at vit gera í dag. Serliga verjan hjá okkum stendur ótrúliga væl, og vit geva teirra álopi tupulleikar allan dystin. Nú hava vit so steðga vestmenningum, so nú verður spennandi, um vit fara at vinna seinnu hálvfinaluna í steypakappingini eisini. Tann dysturin verður heilt sikkur tættur, og eg vænti, at eitt ella tvey mál fara at skilja liðini í tí dystinum.

## Alt gongur galið

Agnar Joensen hjá VÍF helt ikki, at innsatsurin hjá vestmenningum vera nóg góður sunnudagin.

- Her gongur mest sum alt galið hjá okkum í dag. Vit brenna illa, verja ikki, vit sleppa ikki í gjøgnum, og tá vitendiliga sleppa í gjøgnum, so brenna vit. Eg haldi, at menn eru ikki uppsettir til henda dystin. Tað er tó altíð keðiligt at spæla ímóti kollfirðingum, og um 9 dagar møta vit teimum aftur í seinnu hálvfinaluni í steypakappingini. Tá má okkurt heilt annað henda. Eru vit ikki klárir til tann dystin, so eru vit úti av steypakappingini.

TB-ÍF 0-3 (16-25, 19-25, 23-25):

# ÍF á meistarakós

**ÍF vann toppdystin í Trongisvági leygardagin í meistaradeildini hjá kvinnum. Tær lótu ongan iva vera um útfallið, tá tær vitjaðu hjá TB**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til eitt satt brak í oddinum í bestu kvinnudeildini í flogbólti leygardagin, tá TB tók ímóti ÍF í Trongisvági. Undan dystinum var ÍF trý stig undan TB, sum tí hevði alstóran tørv á stigunum.

### ÍF setti seg á dystin

Oddaliðið úr Fuglafirði fekk tó eina ótrúliga góða byrjan í Trongisvági. Í fyrsta setti lótu gestirnir ongan iva vera um, hvat var tað betra av liðunum. ÍF legði seg á odda tíðliga í settinum, og hesa leiðslu øktu tær bara um. TB hevði týðiligar trupulleikar við ÍF, og tá settið var komið at enda, hevði ÍF vunnið trygt, 25-16.

Hetta var ein dreymabyrjan hjá ÍF, sum hevur havt eitt sera gott tak á TB í ár. Kvinnurnar hjá TB høvdu undan hesum dystinum bert vunnið eitt sett ímóti ÍF í undanfarnu dystunum, og tí var longu okkurt, sum bendi á, at ÍF enn einaferð fór at vinna á TB.

Í øðrum setti vísti ÍF enn einaferð, at tær hava sera gott tak á TB. ÍF setti seg eisini á hetta settið frá byrjan av, og enn einaferð tóktist TB at hava stórar trupulleikar at koma fyri seg. ÍF legði seg á odda mest sum alt fyri eitt, og sum settið leið, øktist munurin eisini í hesum settinum. Endaliga úrslitið av øðrum setti gjørdist 25-19 til kvinnurnar úr Fuglafirði.

### ÍF á gullkós

Í 3. setti tóktist TB hava sæð veruleikan í eyguni. Tær royndu nú av øllum alvi at koma innaftur í dystin, og hetta settið gjørdist sera spennandi. Liðini fylgdust mest sum allan vegin, men enn einaferð gjørdist tvørakvinnur ov stuttar. Eisini í hesum settinum eydnaðist ÍF at vinna. Úrslitið gjørdist 25-23, og sostatt hevði ÍF vunnið dystin 3-0.

Við sigrinum hevur ÍF lagt seg klárt á odda í meistaradeildini hjá kvinnum, og í løtuni sær út til, at kvinnurnar úr Fuglafirði stevna beint ímóti FM-gullinum.